FØÐINGAR

7. januar fingu Sóleyg og Jónsvein Poulsen, Vágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3000 gr.

15. januar fingu Natasha og Michael Johnsson, Sig, eina dóttur. hon var 50 cm. long og vigaði 3200 gr.

20. januar fingu Sóleyð Joensen og Sunberg Jacobsen, Vanløse, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3650 gr.

20. januar fingu Óluva Frederiksen og Gundur Michaelsen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 2750 gr.

25. januar fingu Mirjam og Jákup Mikkelsen, Vágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4100 gr.

25. januar fingu Marites og Jógvan Hammer, Eiði, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3000 gr.

27. januar fingu Ann Mari E. og Øssur Kjølbro, Hvidovre, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3850 gr. Hon eitur Rakul Ellebye Kjølbro.

27. januar fingu Liss og Hans Pauli Hansen, Funningsfjørður, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3675 gr.

27. januar fingu Ingibjørg Ingvarsson og Frank Brüchmann, Slangerup, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4750 gr.

28. januar fingu Ann-Mari Haraldsen og Kári Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3950 gr.

28. januar fingu Anna og Søren Bertholdsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4000 gr.

28. januar fingu Lisbeth og Ari Johannesen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4150 gr.

28. januar fingu Beinta Mouritsen og Karl Christiansen, Havn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3000 gr.

28. januar fingu Pia Marx Larsen og Høgni Hentze, Odense, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3818 gr.

29. januar fingu Laila Mortensen og Jógvan Páll Hansen, Saltnes. ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4200 gr.

31. januar fingu Anne og Suni á Dalbø, Miðvágur, tvíburar – synir. Tann eini var 49 cm. langur og vigaði 2675 gr. og hin var 49 cm. langur og vigaði 2500 gr.

ANDLÁT

Elias Jacobsen, Strendur, 76 ár.

24. januar
Jóhann Danielsen, Nólsoy, fyrrverandi vaktarmaður í Føroyingahavnini, 83 ár.
Frank Poulsen, Tórshavn, 79 ár.

27. januar
Henry C. Olsen, í Tórshavn, 76 ár.
Hansina Hentze, í Havn, 67 ár.

28. januar
Juul Jensen, vanliga nevndur Juul á Dunganum, í Sumba, 71 ár.
Ragnar Dimon Jensen, ættaður úr Trongisvági, 79 ár.

29. januar
Anna Vilhelm Kristensen, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Ålborg, 85 ár.
Alfrida Mittelstein, Skopun, 68 ár.

30. januar
Svenn Vatnsdal, av Sandi, 69 ár.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 2. feb.: Andreas Petersen, tlf. 441086
Sunnudagin 3. feb.: Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

TILTØK

Gudstænastur Seksagesima
Havnar kirkja: kl. 11, Bjarni Bæk, talvan gongur fyri KFUK í Havn
Vesturkirkjan: kl. 11, Bergur D. Joensen, altarg. Talvan gongur fyri Heimamissiónini
Kirkjubøur: kl. 12, Heri Joensen, talvan gongur fyri Heimamissiónini
Christianskirkjan: kl. 11, Niels Pauli Danielsen
Árnafirði: kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer. Talvan gongur fyri føroysku Heimamissiónini í øllum kirkjum í Norðoya vestara prestagjaldi
Hov: kl. 12 12,
Porkeri: kl. 14, Marianne Telling
Rituvík: kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalið
Tjørnuvík: kl. 12, altarg., M. Bæk
Hósvík: kl. 12, altarg., I. P. Dam
Gøta: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Selatrað: kl. 12, altarg., Jógvan Friðriksson
Norðskála: kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson. Kirkjukaffi aftaná
Sørvágur: kl. 12, David Johannesen, talvan gongur í Vágs prestagjaldi fyri Heimamissiónina
Elduvík: kl. 12
Hellurnar: kl. 17, altarg., Uni Næs. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri kirkjuligu Heimamissiónina
Saksun: kl. 11, Inga Poulsen Dam
Skálavík: kl. 12, Jákup R. Hansen. (Talvan gongur í Sandoyar presdtagjaldi fyri Heimamissiónini)
Fámjin: kl. 12,
Sandvík: kl. 14, Ólavur Rasmussen

Talvan gongur í Nes prestagjaldi fyri Heimamissiónina.

Í øllum kirkjum í Norðoya eystara og Eiðis prestagjaldi og har afturat í Kollafjarðar, Selatraðar og Sjóvar kirkju gongur talvan fyri Heimamissiónina

Rhema á Hálsi
Friggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. Kids.
Sunnudagin kl. 17 Møti, Friðtór Debes talar.
Bønarmøti verður mána-, týs- og mikukvøldið kl. 20.30. Øll eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman. Andakt og burturluting.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum
Sjómanskvinnuringurin á Argjum kemur saman mánakvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomin.

KFUK skótar 4. grein
Vit hittast mánadagin kl. 19.30 til eitt hvørt ítriv í KFUK.

Frelsunarherurin
Sunnudagin kl. 11 Møti, Palli Petersen talar. Kl. 14 Sunnudagsskúli. Bøn kl. 17.30, kl. 18 Møti, S. J. Joensen talar. Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.
Bøn hvønn mikudag kl. 15.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbrótingu, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

»Tíð til Gud«
verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21. Drekkamuður aftaná. Høvi er at tekna seg til legutúrin á Eiði 8. til 10. februar. Verið hjartaliga vælkomin.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans – imeðan verða smábørn ansaði í lítlasali. Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti – bæði vaksin og børn luttaka við boðskapi til vaksin og børn. Aftaná verður nátturði.
Mánadagin kl. 19 Hugnaløta teirra ungu.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti við Magnus Simonsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn. Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Scott Wilson, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Scott Wilson. Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið
Missiónsvikan heldur fram alla vikuna:
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/Regin Høgnesen,
Manskórið av Sandi syngur.
Sunnudagin kl. 14 Familjumøti/Sunnudagsskúli, Gentukórið syngur, kl. 18 Møti v/ Regin Høgnesen, Meinigheitskórið syngur.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.
Bønarløta er hvørt kvøld ein tíma áðrenn møti byrjar.

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Aglow í Kvívík
Aglow møti verður í Glæmuni í Kvívík, leygarkvøldið 2. feb. kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Elim, Søldafjørður
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 12 Breyðbrótingu og sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti, Elsa og Poul Johan Djurhuus luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Nes prestagjald
Várkonfirmatiónin í Nes prestagjaldi verður í Gøtu kirkju sunnudagin 7. apríl. Ætlanin er at lesa við øllum konfirmantunum nú í vár; so kunnu tey sjálvi velja at verða konfirmerað í vár ella bíða til heystar. Heystkonfirmatiónin verður ætlandi hildin í Fríðrikskirkjuni sunnudagin 6. oktober. Ætlanin er at Gøtubørn ganga til í Gøtu kirkju (fyrstu ferð mánamorgun 18. feb. kl. 8.15 og Tofta-børn í Fríðrikskirkjuni (fyrstu ferð týsmorgun 19. feb, kl. 8.15). Í sambandi við konfirmatiónina eru foreldur/avvarðandi vælkomin til kunnandi foreldrafundir í Gøtu kirkju týskvøldið 5. feb. kl. 20 og í Fríðrikskirkjuni hóskvøldið 7. feb. kl. 20.

Losjan, Gøta
Hjartaliga vælkomin til ein tíma við bíbliuni sunnudagin kl. 19.30 v/ Karen J. Lund og Inger J. Hildershavn.

Gøta
Felagsungdómsmøti verður í Fuglafirði í kvøld kl. 20.
Bilar koyra frá missiónshúsinum kl. 19.30.

B68 húsið
Evangeliskt møti verður í B68 húsinum á Svangaskarði leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 19.

Keldan, Skálafirði
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jóhan Petur Jóhannesen.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Soli Deo Gloria
Mikukvøldið kl. 20 Kvinnurnar møtast.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 19 Alphaskeið, kl. 20.30 Opið Hús – ung vitna.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Pól Thomsen talar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Felags ungdómsmøti
fyri Fuglafjørð, Leirvík og Gøtu kl. 20. »Hvør kann vera ein ytrimissiónstrúboðari« v/ Hera og Maluni Kjærbo. Tey greiða frá teirra trúboðaragerningi í Tansania. Filmur verður eisini vístur.
Missiónsvikan byrjar sunnudagin 3. feb. og heldur á til 10. feb.
Sunnudagin kl. 18 Familjumøti, Frits Thomsen talar.
Barnakórið í Thabor syngur.
Innsavnan til Thabor. Nátturði aftaná.
Mánadagin 4. februar kl. 20 Uni Næs talar, Hannis Hansen syngur.

Lívsins Orð
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Palla Højgaard. Kl. 19 verður møti á Svangaskarði.
Mánadagin kl. 17 møta Liljurnar.

Missiónshúsið í Skopun
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Hans Kristian Jóhannesen, ungdómsráðgeva og Jógvan og Martin. Evni: Frelsuvissan. Drekka verður aftaná.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og Lovsangur, kl. 18 Møti.
Missiónsvikan verður í døgunum 13.-17. feb. Í samband við missiónsvikuna verða bønarmøti hvørt kvøld frá 4. feb. kl. 20.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti við Karl Kenning. Bønarmøti verður 1/2 tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»...hann gav Guði æruna og var fullvísur í tí, at tað, sum hann hevði lovað, var hann eisini mentur at gera«
Róm. 4,20-21

Ábraham hevði fingið tað lyftið frá Guði, at hann skuldi fáa ein son. Tað var alt annað enn lætt at trúgva, at tað veruliga skuldi henda. Har var bara eitt at líta á, at Guð hevði lovað tað; alt annað talaði ímóti. Ábraham og Sára høvdu langt síðani havt gullbrúdleyp.

Í tí aldrinum fáa fólk eingi børn. Tað sigur seg sjálvt. Og tó trúi Ábraham, at tey skuldu fáa eitt barn. Guð hevði sagt tað, og tað, ið Guð hevði sagt, vág meira fyir honum enn alt tað, ein kann siga sær sjálvum.

Soleiðis er við teirra trúgv, sum er livandi. Hon roknar ikki bara við tí, sum vit rópa kensgerningar. Hon roknar fyrst og fremst við Guði. Hon er sannford um,a t tá ið Guð hevur sagt, at hann vil gera nakað, so kann hann gera tað, sjálvt um tað mált við okkara tummastokki sær ógjørligt út, tí fyri Guði er alt gjørligt. Um tað hóvar honum, kann hann venda upp og niður øllum okkara kensgerningum, soleiðis, at tað koma heilt nýggir kensgerningar burtur úr tí. Hann kann siga nakað annað enn tað, ið sigur seg sjálvt. Og tá ið hann sigur hetta annað, roynir hann okkum. So skal tað vísa seg, um vit trúgv aá Guð, ella vit kortini rokna við tí, ið sigur seg sjálvt.

Ábraham stóð royndina og trúgv hansara varð rokna honum til rættvísi. Skulu vit eisini verða rokna fyri rættvís, tó at vit eru syndarar, mugu vit eisini trúgva tí orði, sum Guð sigur. Tað er at geva honum æru. Tað er at rokna Guð fyri at vera Guð.

Amen.

J. S. Myllhamar

TILTØK

Café One Way, Tvøroyri
Fríggjadagin og leygardagin hava vit vitjan úr The Body Shop. Fríggjadagin kl. 18.00-23.00 og leygardagin kl. 10.00-14.00 og kl. 19.00-23.00.

Betania, Porkeri
Kvinnumøti verður mánadagin kl. 20.00.

Betel, Vágur
Fríggjadagin kl. 20.00 Fundur kl. 22.00 Ungdómsfundur
Leygardagin kl. 20.00 Fundur
Talarar: Høgni Johansen og Janus Gunnarsson.
Sangluttøka við ungdómum úr Havn.
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskur fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.

Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur

Frelsunarherurin, Vágur
Møti saman við Sion í Framtíðini kl. 20 fríggjadagin og leygardagin og sunnudagin kl. 18. Kl. 14 Sunnudagsskúli. Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið, allar kvinnur eru vælkomnar.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við *Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 311391/261516.*

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 4. februar
kl. 9.45-10.15 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til móður Theresufelagsskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
Týsdagin 5. februar
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Eyðun Sørensen. **Øll eru hjartaliga vælkomin**
kl. 15 Góðar søgur frá kríngum
Mikudagin 6. februar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur
Hósdagin 7. februar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 8. februar
kl. 10-13 Matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

BRÚDLEYP

Í dag 2. feb., kl. 17 giftast í Havnar kirkju Óluva Nólsoy og Tummas Eli Hansen, Tórshavn. Brúdleypið verður hildið saman við innbodnum.

Í dag, 2. februar kl. 16 giftast í Vesturkirkjuni Karin Vatnsdal, Skopun og Benny Forná, Tórshavn. Vælkomst verður í Flatnagerði 10b aftaná kl. 21.00.

Í dag, 2. februar kl. 17 giftast í Vesturkirkjuni Elsa Thorkildshøj, Tórshavn og Fróði S. Hansen, Tórshavn. Brúdleypið verður hildið saman við innbodnum á Hotel Hafnia.

Leygardagin 16. februar kl. 14 giftast í Rituvíkar kirkju Ulla Hüche Nielsen, Vejle og Ian Højgaard, Rituvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp verða biðin um at siga frá áðrenn 2. februar á tlf. 447634 ella 448056.

Leygardagin 26. januar *giftust* á ráðhúsinum í Vejle Hermod Thorsteinsson og Durita Vilhelmsen, bæði úr Klaksvík.

Leygardagin 23. mars kl. 15.00 giftast í prestagarðinum á Nesi, Armgarð Arnbjarnardóttir Thomsen, Havn og Hans Martin á Regni, Toftir. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 16. mars á tlf. 441217, 227266 ella 220001

SILVURBRÚDLEYP

Leygardagin 2. februar kunnu hjúnini Dagny og Gerhard Tróndheim, Klaksvík halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Betesda kl. 19.

Mánadagin 4. februar kunnu hjúnini Maiken og Hans Mohr, Fuglafjørður halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 2. februar fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

GULL- OG SILVURBRÚDLEYP

Leygardagin 23. februar kunnu hjúnini Jona og Jógvan Hans Joensen, Miðvágur, halda gullbrúdleyp. Sama dag halda hjúnini Inga og Ulrik Krogh, Miðvágur silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Miðvági 23. februar kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða gull- og silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 15. februar á tlf. 332439 ella 332851.

PRÓGV

Astrid Matras, Argir hevur 24. februar staðið prógv sum pedagogur á Seminarinum í Esbjerg.

Randi Næss Joensen, Tórshavn hevur tann 31. desember lokið prógv sum ídnaðarlaborant frá Laborantskúlanum í Keypmannahavn.

Master útbúgving í leiðslu og fyrisiting

BP hevur gjørt av at stuðla einari Master útbúgving í samstarvi við Robert Gordon Universitetið í Aberdeen og Føroya Handilsskúla. Útbúgvingin verður skipað sum parttíðarundervísing og fjarlestur. Tann lesandi kann nema sær eina fullliggjaða Master útbúgving, sama hvar hann býr. Sostatt hava fólk í útjaðaraøkjunum somu møguleikar at luttaka, sum tey, ið búgva í miðstaðarøkinum.

Undervist verður um internetið. Tá ið útbúgvingin byrjar, verður skipað fyri felags kunning, og bólkafundum í tveir dagar í hvørji lærugrein.

Útbúgvingin er býtt upp í trý eitt árs skeið. Hvørt árið gevur endaligt prógv, og er tað upp til tann lesandi, um hann heldur áfram øll trý árini.

	Lærugreinir:	Heitl, eftir lokna prøvtøku:
1. árið:	The Business Environment, Managing People, Finance for Managers, Marketing	-Post Graduate Certificate
2. árið:	Human Resource Management, Planning and Decision Making Economics of Business, eBusiness Systems	-Post Graduate Diploma
3. árið:	Høvuðsritgerð	-Master Degree

Umsøkjarin skal hava lisið í trý ár á universiteti ella liknandi hægri lestrarstovni.

Útbúgving sum fólkaskúlalærari, skipsførari, maskinmeistari og frá hægri handilsskúla o.l. útbúgvingar, kunnu eisini geva atgongd til upptøku. Eisini kunnu drúgvar førleikagevandi arbeiðsroyndir geva rætt til upptøku.

Kunnandi fundur verður mánadagin 4. februar 2002 kl. 16:00, á Føroya Handilsskúla í Havn. Umboð frá Robert Gordon Universitetinum í Aberdeen luttaka.

Útbúgvingin byrjar 4. mars 2002.

Umsóknarfreistin er mánadagin 11. februar 2002. Umsóknarblað fáast við at venda sær til Føroya Handilsskúla.

Áhugað eru vælkomin at seta seg í samband við Elsu Mariu Holm Olsen, deildarstjóra á Føroya Handilsskúla á Kambsdali, tel. 444900 ella við telduposti: elo@kambsdal.olivant.fo, at frætta nærri um útbúgvingina.

THE ROBERT GORDON UNIVERSITY ABERDEEN
FØROYA HANDILSSKÚLI
bp